Kommunufelagið

Fiskimálaráðið
Heykavegur 6
100 Tórshavn

Dagfesting
14. november 2017

Okkara j.nr.
17/03679-2

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.
17/00461-18

**Viðv.: uppskoti til løgtingslóg um veiðigjald**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda lógaruppskot, ið er sent felagnum til hoyringar.

Sum sæst í uppskotinum undir brotinum *“Avleiðingar av uppskotinum – Fíggjarliga og umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur”*, metir ráðið, at kommunurnar við uppskotinum fara at fáa umleið 8 mió. kr. minni inn í partafelagsskatti.

Partafelagsskatturin er ein av inntøkukeldunum hjá føroysku kommununum, og tí vil Kommunufelagið prinsipielt átala, at landsstýrið ger broytingar í fortreytunum fyri kommunalum inntøkukeldum, uttan at hetta er gjørt í samráði við kommunurnar ella við at kommunurnar á nakran hátt eru tiknar við uppá ráð hesum viðvíkjandi.

Í øðrum lagi skal viðmerkjast, at tað er lítið sannlíkt, at tá ið 300 mió. kr. verða tiknar inn frá vinnuni, so kostar hetta kommununum bert 8 mió.

Í uppskotinum sæst eisini, at hetta uppskot er avleitt av, at samgongan hevur sett sær fyri, at ein skipan skal setast í verk, so at øll, ið hava og gagnnýta føroyskt fiskirættindi, skulu lata landinum eitt gjald. Eisini verður í viðmerkingunum víst til, at sama er staðfest í fyriliggjandi uppskoti til lóg um fyrisiting av sjófeingi.

Givið er, at bæði hesi uppskot hava ymsa og stóra ávirkan á alt samfelagið. Kommunufelagið metir tí, at nærri greiningar av fíggjarligu og samfelagsligu ávirkanini av uppskotunum áttu at verið gjørdar, soleiðis at ikki bert beinleiðis ávirkan bleiv lýst, men eisini avleiddir virknaðir av uppskotunum blivu lýstir og kundu viðgerast.

Prinsipielt metir Kommunufelagið harumframt, at í tann mun at nýggjar inntøkur verða skaptar, sum t.d. í hesum føri við tilfeingisgjaldi/tilfeingisrentu, eiga kommunurnar at fáa ein sjálvsagdan lut í hesum inntøkum, hetta tí at tað í stóran mun eru kommunurnar sum gera íløgur av ymsum slagi, sum eru við til at skapa fyritreytirnar fyri, at hetta tilfeingið kann koma til høldar.

Kommunufelagið

Vegna

Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri